## Fyrireika seg til rúmdarferð á Suðurpólinum

Evropeiski rúmdarstovnurin ESA ætlar at senda fólk upp á gongustjørnuna Mars í 2030, og nú hevur stovnurin sett sær fyri at kanna, hvussu viðurskiftini har kunnu ávirka tey, sum skulu við.

Hesar kanningar skulu gerast á fronsku rannsóknarstøðini Concordia á Antarktis, tí hildið verður, at viðurskiftini har líkjast nógv viðurskiftunum á Mars. Í hesum døgum eru tíggju vísindafólk í ferð við at fyrireika seg til kanningarnar, sum skulu gerast í summar. Tá er vetur við Suðurpólin, og tað ringa vetrarveðrið har ger, at støðin hevur at kalla einki samband við umheimin teir seks mánaðarnar, kanningarnar vara. Ætlanin við kanningunum er at vita, hvussu tað ávirkar fólk sálarliga at vera avbyrgd á einari kanningarstøð í eitt hálvt. Harafturat skulu ymsar lívfrøðiligar kanningar gerast.

Millum vísindafólkini, sum fara til Suðurpólin, er danski evnafrøðingurin Cathrine Frandsen. Hon hevur fyrr tikið lut í einari tilsvarandi kanning á einari rannsóknarstøð í Norðurkanada.

## Við barn við pápa sínum

Svenska ákæruvaldið hevur ákært ein mann fyri at hava neyðtikið sína egnu dóttur fleiri hundrað ferðir.

Tá dótturin var tólv ára gomul, átti hon eitt barn. Starvsfólkini á føðideildini fingu illgruna um, at alt ruggaði ikki rætt. Pápin var hjá henni alla tíðina, hann vaskaði henni, og hann var inni á føðistovuni, tá hon átti. Hetta hildu starvsfólkini vera løgið, so tey varskógvaðu myndugleikarnar, sum tó ikki gjørdu nakað við málið. Longu árið eftir var gentan aftur við barn, men hesaferð valdi hon at taka fostrið.

Nú er komið fram, at pápi gentuna er pápi at barni hennara, og at hon eisini var við barn við pápanum ta seinnu ferðina. Gentan hevur greitt myndugleikunum frá, at pápin neyðtók seg fleiri hundrað ferðir heima hjá teimum sjálvum, uttanfyri og í bilinum. Málið hevur vakt stóran ans, og mong spyrja, hvussu tað bar til, at myndugleikarnir ikki lurtaðu eftir starvsfólkunum á føðideildini, tá tey fingu illgruna um, at alt ruggaði ikki rætt. Men umboðsmaðurin, sum hevur kannað málið, sigur við Aftonbladet, at tá var einki, sum bendi á, at pápin misbrúkti gentuna.

## Fiskurin skal arbeiðast



Norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen, er til reiðar atr krevja, at fiskur skal arbeiðast har, hann verður landaður.

Í dag kunnu feløg, sum eiga bæði skip og virki á landi, koyra fiskin í bingjur og senda hann óvirkaðan av landinum. Á hendan hátt halda feløgini reglurnar um at landa fiskin á staðnum, men trupulleikin er, at fiskurin gevur einki arbeiði á teimum lokalu fiskavirkjunum, og tí er Helga Pedersen til reiðar at noyða feløgini at arbeiða fiskin har, hann verður landaður, skrivar Nordlys.

Ein kanning hjá fiskimálaráðnum hevur víst, at tað eru serliga feløg í teimum norðurnorsku býunum so sum Mehamn og Vardø, sum senda fisk óvirkaðan av landinum.

## Hon verður afturvald

Sunnudagin verður forsetaval í Finnlandi, og alt bendir á, at verandi forsetin, Tarja Halonen, verður afturvald til eitt seks ára skeið afturat.

Tær seinastu veljarakanningarnar siga, at Tarja Halonen fær millum 51 og 55 prosent av atkvøðunum, og at teir báðir kappingarneytarnir, Sauli Niinistø og Matti Vanhanen, fáa smá 20 prosent hvør. Skal Halonen vinna valið sunnudagin, skal hon hava meiri enn 50 prosent av atkvøðunum. Fær hon ikki tað, verður umval annan sunnudag. Tað er annars ikki vanligt við umvali í Finnlandi, og tað seinasta var í 1978, tá Uhro Kekkonen bleiv afturvaldur.

Tann 62 ára gamla sosialdemokratiska Tarja Halonen er sera væl umtókt í heimlandinum, og tað eru serliga kvinnurnar, sum velja hana.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Vænta gos í Alaska



*Tann nógva øskan frá gosfjallinum hevur darvað flogferðsluni*

**Jarðfrøðingar vænta, at gosfjallið Augustine í Alaska fer at goysa**

GOS
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir seinastu dagarnar hevur gosfjallið Augustine sent royk og øsku einar átta kilkometrar upp í luftina. Hósdagin gjørdi fjallið minni um seg, men jarðfrøðingarnir vænta kortini, at tað fer at enda við einum veruligum gosi fyrr ella seinni.

Augustine er 1.240 metrar høgt, og amerikonsku jarðfrøðingarnir siga, at lív kom í fjallið orsakað av einum veikum jarðskjálvta í Cook-fjørðinum sunnan fyri høvuðsstaðin Anchorage. Tann nógva øskan, sum er komin úr fjallinum, hevur eisini órógvað flogferðsluna til og úr býnum.

Augustine goysti seinast í 1986, og tað næstseinasta gosið har var í 1976.

# Iran setir hart ímóti hørðum

**Verður kjarnorkuverkætlanin hjá Iran løgd fyri trygdarráðið hjá ST, fer Iran at kvetta alt samstarv við altjóða kjarnorkueftirelitið**

KJARNORKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrradagin gjørdu Týskland, Frakland og Bretland av at viðmæla trygdarráðnum hjá ST at umrøða, hvat skal gerast fyri at noyða Iran at gevast við sínari kjarnokruverkætlan. USA boðaði alt fyri eitt frá, at tað tekur undir við tilmælinum, og russiska stjórnin hevur eisini sagt seg taka undir við tí.

Men tað ávirkar eftir øllum at døma ikki stjórnina í Teheran.

– Ger trygdarráðið av at viðgera okkara kjarnorkuverkætlan, fara vit at kvetta sambandið við kjarnorkueftirlitið IAEA, segði iranski uttanríkisráðharrin, Manouchehr Mottaaki, við sjónvarpsstøðina Khabar í morgun. Hann ávaraði tey evropeisku londini ímóti at taka nakað stig, sum kann forða Iran at samstarva við IAEA.

Við almennu iransku tíðindastovuna segði Mottaki, at stjórnin fer at halda ein lóg, sum tjóðartingið samtykti í november, og sum sigur, at landið skal kvetta sambandið við kjarnorkueftirlitið, um trygdarráðið hjá ST leggur seg út í kjarnorkuverkætlanina.

Fyrrverandi iranska stjórnin skrivaði undir eina semju við IAEA um eftirlit við landsins kjarnorkuútbúnaði, men tann nýggja tingið hevur sýtt fyri at steðfesta avtaluna. Tingið og stjórnin halda uppá, at landið ætlar einans at brúka kjarnorkuna til friðarlig endamál, men bæði Vesturheimurin og Russland stúra fyri, at Iran ætlar at útvea sær kjarnorkuvápn.

# Russland framvegis ein hóttan fyri grannarnar

Meðan flestu evropearar eru á einum máli um, at tey kaldligu viðurskiftini ímillum eystur og vestur hoyra einari farnari tíð til, ávarar ein fyrrverandi finskur verjuovasti grannarnar hjá Russlandi ímóti at halda, at so er alt gott.

Gustav Hagglund, generalur, sum hevur verið formaður í verjunevndini hjá ES, sigur við Aftenposten, at Noreg og hini grannalondini hjá Russlandi mugu altíð vera til reiðar at verja seg, og sjálvur er hann heitur talsmaður fyri einari sterkari finskari verju. Tí eingin veit, hvat kann henda í Russlandi, sigur hann.

– Hvussu mong okkara væntaðu, at Sosjetsamveldið skuldi fara í upploysn eftir so stuttari tíð, spyr generalurin.